[ September ]

# Pipar & Salt setir met

**Føroyingar elska at flenna eftir sær sjálvum, og Pipar & Salt duga betur enn onnur at fáa alskyns sløg av føroyingum at síggja láturligar út. Fleiri enn 8000 fólk hava sæð showið hjá Pipari og Salt, og tað er met í Norðurlandahúsnum**



*Pipar & Salt fáa føroyingar at flenna eftir sær sjálvum, og nýggja showið hjá teimum er so væl umtókt, at neyðugt var við 20 eykasýningum í Norðurlandahúsinum*

Tað byrjaði við tveimum sýningum til Listastevnuna, men tað vildi ongan enda taka, tí áhugin var so ovurhondsstórur.

Pipar & Salt eru ein buldrandi succes í føroyskum undirhaldið. Tað hava øll vita í langa tíð, men tað var aftur staðfest við showinum hjá teimum í Norðurlandahúsinum, sum hevði ikki færri enn 20 eykasýningar. Væl omanfyri 8000 fólk vóru til showini, og tað er met í Norðurlandahúsinum. Harafturat hava Pipar & Salt eisini spælt fyri fullsettum høllum aðrastaðni í landinum.

Sjúrður Skaale, ið er saltið í piparinum, ella piparið í saltinum sigur, at hann heldur, tað vera ótrúligt so góð undurtøkan hevur verið. Hann roknar við, at ein av orsøkunum ivaleyst er tann, at eingin ólavsøkukaberett var í ár, so tørvurin eftir onkrum at flenna at var stórur.

Harumframt hevur Norðurlandahúsið hesuferð givið teimum sera góðar treytir. Seinast var einans møguligt at hava fimm sýningar, tí okkurt annað tiltak skuldi inn. Men hesuferð hevur húsið latið hølini til ikki færri enn 22 sýningar, og hetta fegnast teir um.

## At flenna at sær sjálvum

Sjúrður heldur orsøkina til tí góðu móttøkuna, sum Pipar & Salt fær millum manna, vera, at fólk hava tørv á at flenna at sær sjálvum. Typurnar í Pipar & Salt eru nokkso vanligar, og fólk kenna seg sjálvan og onnur aftur í teimum, og hetta ger tað stuttligt.

Fleiri av teimum kendu fólkunum, ið Pipar & Salt gera gjøldur burtur úr, hava verið og hugt at showinum, eitt nú Heðin Mortensen og Tórbjørn Jakobsen. Men Sjúrður heldur ikki, at teir hava verið fornermaðir av tí, sum teir hava sæð. Hann sigur seg ongantíð hava møtt nøkrum, sum hevur verið fornermaður av skemtinum.

– Hetta er jú ikki illa meint á nakran hátt, sigur Sjúrður.

Í Trongisvági var móttøkan t.d. serstakliga góð, eisini móttøkan av skemtinum um suðuroyingar, sum hevur ein stóran leiklut í showinum.

## Trimma show

Tá Sjúrður og Jákup saman við tónleikarunum Kim og James fara á pallin til seinasta showið í Norðurlandahúsinum er showið nakað broytt frá fyrstu ferð, tað varð framført. Onkur aktuell ting eru komin upp í, okkurt er tikið burtur, og sum heild er alt trimmað og strammað eitt sindur.

Men Sjúrður heldur ikki, at broytingarnar hava verið nógvar í ár, ikki so nógvar sum teir av fyrstan tíð høvdu ætlað.

» Heilsuverkið er eitt botnleyst hol. Tí er tað ikki rætt, at vit rinda so nógv fyri tilbúgvingar, har starvsfólk sita og trilla tumlar og sjáldan verða aktiverað, fyri síðani at avspáka um dagin. «

*– Jóhan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum*

» – Vit mugu tosa saman um, hvussu vit fáa sum mest burtur úr, og tað destruktiva prátið um, hvat vit nú skulu niðurleggja á sjúkrahúsunum, kunnu vit gloyma, tí tað førir ikki til nakað «

*- Jákup Petersen, leiðandi yirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi*

**»Nú ælti eg mær at hugna mær við familjuni og annars hugsa um klædnafyritøkuna hjá mær, sigur Allan Simonsen, fyrrverandi føroyskur landsliðsvenjari, sum gevst sum venjari.**

## Finnbogi farin

Finnbogi Ísakson doyr 62 ára gamal. Finnbogi hevur í eina slaka hálva øld verið við til at seta dám á føroysku samfelagsmenningina. Hann var kanska best kendur sum politikari, men hann var eisini slóðbrótandi fjølmiðlamaður.

– Bæði politiskt og í øðrum viðurskiftum eyðkendi tað Finnboga, at hann var ótrúliga góður til at síggja samanhangin í tingunum. Hann var vitugur, og hann dugdi væl at analysera, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri.

## Fólk vilja hava kol

Eftirspurningurin eftir koli úr Hvalba er nógv vaksin seinastu mánaðirnar. Høgi oljuprísurin ger sítt til, at fólk vilja hava kol at brenna.

– Tað ringja fólk dag og dagliga at biðja um kol, men tíverri fáa vit ikki annað enn boðað teimum frá, at onki kol er eftir, sigur Jan Poulsen, stjóri í Roynds Kolasølu.

Hann sigur, at táið teir fóru í summarfrí á Ólavsøku, høvdu teir so mikið av koli niðurfyri, at teir plagdu at klára seg til nakað langt út í oktober. Men í ár varð seinasti sekkurin seldur longu í august.

## Klassamunur í Fraklandi

Føroyar tapa 3-0 ímoti Fraklandi í HM-undankappingardysti, og stórur munur er á føroyska og franska liðnum hendan dagin.

- Har vóru nokk einir tveir ella tríggir klassar á muni í spælinum. Vit gera alt tað, sum vit eru mentir, men tað munar bara ikki stórvegis. Teir hava eitt lið í heimsflokki við skjótleika og tekniskum førleika, sum bara kanst hyggja at. So eitt tap upp á 3-0 kunnu vit ikki klaga um, sigur landsliðsvenjarin Henrik Larsen eftir dystin.

## Brúktu høvdið í Leirvík

Høvdavirkið í Leirvík verður kosið til Ársins virki á vinnudegnum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

– Eg eri errin av at vera stjóri á einum virki og síggja, hvussu væl so nógvar tjóðir kunnu arbeiða so væl saman og náa so høgum málum, sum vit hava nátt, sigur stjórin Eirikur á Húsamørk.